# Landsstýrið virðir ikki tingið

*Finnur Helmsdal heldur, at tíðindafundurin í Tinganesi týsdagin greitt sýndi, at landsstýrið vanvirðir tingið og tingfólk annars*



*Finnur Helmsdal vónar, at løgmaður fer at verða eins konsekventur í øðrum førum, har tað er neyðugt, sum hann var, tá hann á tíðindafundi týsdagon legði eftir tingmonnum*

John Johannessen

– Løgmaður sýnir vanvirðing fyri tinginum, tá hann velur at krossfesta tingmenn á tíðindafundi í Tinganesi í staðin fyri at halda samgongufund um trupulleikarnar í samgonguni.

Finnur Helmsdal, tingmaður Tjóðveldisfloksins, heldur løgmann hava borið seg skeivt at í sambandi við ósemjuna, ið hevur tikið seg upp um handfaringina hjá Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu í pensjónsmálinum.

– Tíðindafundurin í Tinganesi týsdagin sýndi heilt greitt, at løgmaður hevur valt ta hørðu linjuna ímóti tingmonnunum, ið hava sýnt sína ónøgd við handfaringina av pensjónsmálinum, hóast tað er landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum, ið hevur borið seg skeivt at.

## Ódemokratiskt

– Eg haldi, at tað, løgmaður gjørdi á tíðindafundinum týsdagin var ógvuliga ódemokratiskt. Hann átti á tíðindafundinum at sagt fólki, hvat Helena Dam á Neystabø hevði gjørt skeivt, men tað gjørdi hann ikki. Í staðin legði hann eftir tingfólkum. Hetta kann ikki vera rætt, heldur Finnur Helmsdal.

Tingmaður Tjóðveldisfloksins vónar, at løgmaður, í staðin fyri at leggja eftir tingfólkum, heldur fer at bróta upp um armar og verið konsekventur í førum, tá hann skal vera tað.

Løgmaður segði á tíðindafundi í Tinganesi týsdagin, at hann metti, at tingfólk í samgonguni ikki høvdu sett seg nóg væl inn í málið um pensjónsskipanina áðrenn tað kom til viðgerðar í tinginum.

Uppskotið var nevniliga sent øllum flokkum í samgonguni til ummælis áðrenn tað fór í tingið, og høvdu tingfólk ikki havt høvi at sett seg nóg væl inn í tað, var tað tí at floksapparatini ikki vóru í lagi. Løgmaður helt, at samgongufl okkarnir í størri mun áttu at leggja seg eftir at semjast um uppskotini, áðrenn tey verða løgd fyri tingið.

– Øll uppskot frá landsstýrinum verða send tingfólkum til ummælis, men vit fáa sjáldan nakrar viðmerkingar aftur frá tingfólkunum, segði løgmaður á fundinum týsdagin.

Finnur Helmsdal er samdur við løgmanni í, at floksappartini ikki altíð virka so væl, men vísir samstundis á, at hetta ikki var trupulleikin í hesum føri.

## Stendur við sítt

Tað sýntist sum friður aftur valdaði í samgonuni eftir landsstýrisfundin, tíðindafundin og at enda floksfundin hjá Sjálvsstýrisflokkinum týsdagin, men Finnur Helmsdal stendur enn við hvørt einasta orð, hann hevur skrivað og sagt um handfaringina hjá Helenu Dam á Neystabø av nýggju pensjónslógini.

Finnur Helmsdal heldur, at uppskotið hjá landsstýriskvinnuni kom alt ov seint í tingið, og hartil var tað als ikki fullfíggjað.

Spurningurin til Finn Helmsdal í hesum sambandi er, hví hann ikki vísti á sína ónøgd við uppskotið undir viðgerðini í tinginum í staðin fyri at koma við grovum skuldsetingum móti landsstýriskvinnuni, nú pensjónslógin er samtykt.

– Tá landsstýriskvinnan í fjølmiðlunum gav løgtinginum skuldina fyri, at tað gekk sum tað gekk við nýggju pensjónslógini, valdi eg at svara aftur og vísa á, at tað ikki var tingið, men landsstýriskvinnan, ið bar seg skeivt at.

## Áttu at víst málinum aftur

Finnur Helmsdal ásannar tó, at hann átti at gjørt ógvusligari vart við ónøgd sína um málið undir politisku viðgerðini. Hann er sannførdur um, at hann átti at havt víst málið frá sær, tá tað var til viðgerðar í trivnaðarnevndini, har hann er limur.

– Eg helt eina dundurrøðu um málið undir viðgerðini í desember, men tað hjálpti so einki. Men eftir atfinningarnar frá løgmanni á tíðindafundinum ætli eg mær í størri mun frameftir at hugsa um at vísa slík mál frá mær í trivnaðarnevndini.

Eina orsøk til, at tingfólk ikki fingu høvi at vísa á skeivleikar í uppskotinum heldur Finnur Helmsdal vera, at málið kom alt ov seint í tingið.

– Fyrri parturin um sjálva pensjónslógina kom í tingið í vár, og tá lovaði landsstýriskvinnan, at seinni parturin skuldi koma fyri beint eftir ólavsøku. Men so varð ikki. Málið varð skrumblað ígjøgnum í endanum av árinum. Orsøkin til, at vit góðtóku hetta var, at vit lótu landsstýriskvinnuna tosa okkum upp í lag.

Hetta heldur Finnur Helmsdal í alt ov stóran mun kemur fyri, tá mál koma úr landsstýrinum í tingið. Tey koma alt ov seint í tingið, og mugu tey tí skundast ígjøgnum. Men Finnur Helmsdal vísir tó á, at sama eisini hevur verið galdandi fyri aðrar landsstýrissamgongur.

## Skal ikki rullast við høvdum

Hóast Finnur Helmsdal er ógvuliga ónøgdur við arbeiðsháttin hjá Helenu Dam á Neystabø, hevur hann ongar ætlanir um at leggja fram misálit á landsstýriskvinnuna.

– Eg krevji ikki, at høvd skulu rulla, men eg haldi, at landsstýriskvinnan eigur at taka atfinningarnar til eftirtektar, sigur hann.







*Formaður Tjóðveldisfloksins heldur, at løgmaður tveitur landsstýrismannaábyrgdina yvir á tingfólk ístaðin fyri rætta landsstýrisfólkið, tá hann velur at harta tingmenn ístaðin fyri at vísa á mistøkini hjá Helenu Dam á Neystabø*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Løgmaður leggur upp til einaræði

*Formaður Tjóveldisfloksins heldur tað vera at leggja upp til einaræði, tá løgmaður vil hava uppskot frá landsstýrinum at vera hálvgum samtykt árenn tey koma fyri tingið*

John Johannessen

– Er samgongan liðug at viðgera øll lógaruppskot áðrenn tey koma fyri tingið, verður andstøðan sett til viks, og hetta er at seta fólkaræði til viks.

Heini O. Heinsen, formaður Tjóðveldisfloksins, heldur tað vera skeivt av løgmanni at meldað út, at lógaruppskot frá landsstýrinum skulu vera so mikið gjølla viðgjørd millum samgongulimir áðrenn tey verða løgd fyri tingið, at tey hálvgum eru samtykt.

## Í stríð við stýrisskipanina

– Sjálvandi skal tað, sum landsstýrið leggur fyri tingið vera fulfíggjað. Men tað merkir ikki, at tað skal viðgerast aðrar staðir enn í landsstýrinum, áðrenn tað kemur fyri tingið.

Heini O. Heinesen heldur tað vera í stríð við stýrisskipanina at viðgerða mál til fulnar millum samgongutingfólk áðrenn andstøðan fær høvi at seta seg inn í tey og koma við sínum viðmerkingum. Málsviðgerð eigur at fara fram í tinginum, heldur hann. Alt annað metir hann ber brá av einaveldi.

– Eg haldi ikki, at løgmaður kann krevja, at øll samgongan skal taka undir við einum máli, bert tí tað er samtykt í landsstýrinum.

## Flytir ábyrgdina

Heini O. Heinesen sigur seg taka fult undir við øllum útsagnunum hjá floskfeløgum sínum, Finni Helmsdal og Pálli á Reynatúgvu, viðvíkjandi pensjónsmálinum. Men hann viðgongur tó, at summar orðingar hesir báðir hava nýtt um landsstýriskvinnuna hava verið heldur óhepnar.

Men at løgmaður á tíðindafundi í Tinganesi velur at harta tingmenn í staðin fyri at vísa á mistøkini hjá Helenu Dam á Neystabø, góðtekur formaður Tjóðveldisfloksins ikki. Hann sigur hetta vera at tveita landsstýrismannaábyrgdina yvir á tingfólk í staðin fyri á rætta landsstýrisfólkið.

– Í stýrisskipanini hava vit eina lóg um landsstýrismannaábyrgd, og henni eiga vit at fylgja. Tí eigur Helena Dam á Neystabø og eingin annar ábygdina av óskilinum í pensjónslógini.

## Einki misálit

Hóast formaður Tjóðveldisfloksins metir framferðina hjá Helenu Dam á Neystabø í pensjónsmálinum vera beinleiðis ræðuliga, hevur hann ongar ætlarnir um at leggja misálit á landsstýriskvinnuna.

Heini O. Heinesen heldur heldur ikki, at ósemjan hóttir samgonguna,

– Vit eru ógvuliga keddir um framferðina, men mugu bara sláa kalt vant í blóði meðan landsstýriskvinnan syrgir fyri at fáa tingini í rættlag, sigur hann.

Orsøkina til, at tikið varð undir við lógaruppskotinum, hóast tað ikki var fullfíggjað, sigur Heini O. Heinesen vera, at málið kom alt ov seint í tingið, og varð tað tískil skrumblað ígjøgnum.


Skíðferð til Eysturríkis

St Anton am Arlberg








Flogfelag Føroya skipar fyri skíðferð til Eysturríkis. Farið verður úr Føroyum 5. februar 2000 um Keypmannahavn og heimferðin verður 12. februar. Gist verður í kenda skíbýnum St. Anton, ið hevur alt tað, ið krevst fyri at skíðferðin verður eitt minni fyri lívið.

**Kostnaður**
4 pers. í eini íbuð........................ úr 7.500,- pr. pers.

Børn undir 12 ár (saman við vaksnum).... úr 5.700,- pr. pers.

*Íroknað í kostnaðinum er:*
*Flogferð, gisting, flutningur og liftkort*

**Hotel Karl Schranz**
4 pers. v/ hálvpensión................. 10.500,- pr. pers.

Børn undir 12 ár (saman við vaksnum).... 5.700,- pr. pers.

*Íroknað í kostnaðinum er:*
*Flogferð, gisting, flutningur og liftkort*

***Seinasta freist at bíleggja pláss er 10. januar***
Ring ella støkk inn á gólvið og fá meira at vita

FLOGFELAG FØROYA
Áarvegur 6 • Postboks 3225 • FO-110 Tórshavn
Tel 31 10 25 • Fax 31 86 70 • e-mail: ff@post.olivant.fo